**Tilmælið frá Føroya Óðalsfelag** er, at vit seta ”norska” lógaruppskotið á standby, og kanna møguleikarnar fyri hvussu vit kunnu arbeiða víðari við tí, fram móti eini føroyskari náttúruverndarlóg, sum hóskar til Føroyar.

Fyri hesuferð at tryggja øll neyðug áhugamál sum hava tilknýti til føroysku náttúruna, mæla vit til, at landsstýriskvinnan setir ein arbeiðsbólk, har m.a. Óðalsfelagið og Bóndafelagið fáa hvør síni umboð.

Vit sum umboða landbúnaðin og tey lokalu jarðarviðurskiftini úti um landið, vilja fegin gerast ein konstruktivur partur í hesum týdningarmikla arbeiðinum at gera eina nýggja náttúruverndarlóg.

Vit sum eru góð við náttúruna og hava tilknýti til teir einstøku lokalu hagarnar, ynskja okkum eina náttúruverndarlóg sum ger tað sum hon sigur: Verjir náttúruna.

Umframt at vísa á viðheftu kanning: *Lýsing av løgfrøðiligum ivamálum - og avbjóðingum annars - við fyriliggjandi uppskoti til løgtingslóg um náttúruvernd, LM-067/2022*, vilja vit fegin koma við nøkrum fáum konstruktivum tilmælum til okkara nýggja náttúruverndarlóg:

- Fokusera uppá primera verndar-objektið, náttúruna, heldur enn at blanda øll møgulig onnur atlit inn í lógina, sum kunnu arbeiða ímóti náttúruverndini. (Upplivingarvirði, virkið útilív, gongd í haga, ferðavinnu, o.a). Nýggja føroyska lógin eigur at staðfesta, at náttúran verður vard fyri sína egnu skuld, og sum grundarlag undir burðardyggari matframleiðslu.

- Nýggja lógin má ikki geva "týðandi samfelagsáhugamálum" møguleikan fyri undantøkum frá nátúruverndini.

- Lat nýggju lógina tryggja ítøkiligar mannagongdir fyri hvussu verndarátøk verða skipaði, í samstarvi og við samtykki frá lokalum ognarfólki, festarum og bygdafólki. Tá verða verndarátøkini væl grundaði frá byrjan, og tá tryggja vit eisini tær bestu lokalu loysninar, til ta bestu lokalu náttúrufyrisitingina. Framlagda norska uppskotið gevur ikki meining. Vit fáa ikki skapt og umsitið verndarøkini væl, uttan so at fólk á staðnum kenna seg vird, og vilja átaka sær at samstarva. Fyri at virka væl, hevur lógin brúk fyri førleikunum hjá lokalfólki úti um alt landið. Semjur og samstarv byggja brýr. Tvingsil og ognartøka brenna brýr.

- Nýggja føroyska uppskotið má tryggja ognar- og avgerðarrættin. Ognartakandi inntrivini í lógini kunnu ikki avmarkast til bert at veita endurgjald fyri ”brúk sum er í gongd". Heldur eiga vanligu endurgjaldsreglurnar at verða nýttar, sum eisini taka støði í framtíðar brúks- vinnu- og sølumøguleikum hjá teimum sum eiga ella festa jørðina. Tá verður ognar- og ræðisrætturin virdur, landbúnaðurin fær frið at virka og gera íløgur, og tá verða heilt víst eisini færri konflikt-støður.

- Norska lógin, rættarskipanin og jarðarviðurskiftini kunnu ikki brúkast sum fyrimynd fyri Føroyar. Halt fast við serføroysku jarðarlógirnar og serføroysku staðbundnu náttúrufyrisitingina. Og byggið heldur ta nýggju føroysku náttúruverndalógina inn í verandi náttúrufyrisiting og verandi friðingarnevndir. Jarðalógirnar mugu framhaldandi verða galdandi, eisini tá øki verða løgd um til verndarøki.

- Varðveit ta vælvirkandi og skjóttarbeiðandi skipan vit longu eiga, við dómstólslíknandi pragmatiskum organum uttanfyri politisku skipanina. Brúka pengarnar uppá at styrkja friðingarnevndirnar við einum sekretariati av lógarserfrøðingum og náttúruserfrøðingum, heldur enn at uppbyggja eina nýggja, dýra og ikki líka góða skipan, innanfyri politisku skipanina.

- Nýggja náttúrverndarlógin má varðveita valdið hjá Føroya Løgtingi. Latið ikki ein einstakan landsstýrismann- ella kvinnu fáa so víðar heimildir.

**Lýsing av løgfrøðiligum ivamálum - og avbjóðingum annars - við fyriliggjandi uppskoti til løgtingslóg um náttúruvernd,  LM-067/2022**

Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinna i umhvørvismálum, hevur lagt fram uppskot til nýggja løgtingslóg um náttúruvernd. Uppskotið líkist nógv uppskotinum um náttúruvernd, sum undanfarna samgonga legði fram í fjør, men sum fall burtur.

Fyrra uppskotið fekk nógvar álvarsligar atfinningar frá Lógartænastuni, har tað m.a. stóð, at ásetingin (*red.*: § 6) er kollveltandi og brýtur fullkomiliga við útgangsstøðið, at alt livandi tilfeingi, sum tað ikki er lóggivið um, kann veiðast frítt. Ásetingin er tí ógvuliga víðfevnd, serliga tá hugsað verður um meginregluna um ikki at lóggeva, uttan so at tað er neyðugt. Somuleiðis tykist ásetingin undarlig, tá havt verður í huga, at Føroyar vanliga meta seg sum eitt veiðusamfelag, skrivaði Lógartænastan.Viðmerkjast skal, at ásetingin er ikki stórvegis broytt, hóast hesar atfinningar.

Í hesum skjali verður hugleitt yvirskipað um uppskotið. Komið verður inn á grundlógarinnar § 73, stk. 1, ið verjir privata ognarrættin og spurdómar viðv. endurgjaldi, ið uppskotið leggur upp til. Eisini verður komið inn á tað stóra vald, ið Løgtingið letur upp í hendurnar á einum landsstýrismanni at skipa nærri fyrisitingarliga – tó uttan at kenna kunngerðaruppskotini, ið helst langt frá enn eru fyrireikað. Áðrenn tikið verður samanum, verður komið inn á, hvørjar avleiðingarnar vera av at leggja kærur til Føroya Kærustovn og vanligu rættarskipanina, tá ið øki verða løgd út sum verndarøki.

## 1. Yvirskipað um lógaruppskotið um náttúruvernd

Uppskotið er týtt úr einari norskari lóg, *lov om forvaltning av naturens mangfold*, sum sjálvsagt er gjørd eftir norskum viðurskiftum og fyritreytum. Norska lógin er eitt produkt av altjóða skyldum Noregs, og tess serligu umstøðum, og tí er tað løgið, at Føroyar nærum skulu avrita nakað, ið er serstakt fyri Noreg.

Tá ið føroyska uppskotið byggir á norska lóg, norska rættarskipan og norsk viðurskifti/fyritreytir, kann tað lættliga hugsast at fara at seta partarnar munandi verri, um teir í rættar- og trætumálum skulu kenna til norsku fyrimyndarlóggávuna, dómar úr henni og eisini

norskar siðvenjur, endurgjaldsreglur v.m. Av tí sama kann tað gerast óneyðuga dýrt og tíðarkrevjandi hjá pørtunum at seta seg inn í norsku rættarstøðuna og norsku kringumstøðurnar, ið hava verið orsøkin til norsku lóggávuna, tá ið náttúruverndarlógin skal brúkast í rættar- og trætumálum í Føroyum.

Sum dømi um munandi øðrvísi kringumstøður í Føroyum samanborið við Noreg kann nevnast, at jarðarviðurskifti og siðvenjur í Føroyum eru øðrvísi enn í Noregi, og at Noregi er áleið 275 ferðir størri til víddar enn føroyska landøkið. Í Noregi er stórur partur av lendinum skógur, hálendi, órørt lendi, meðan bert ein lítil partur, 3,5 prosent, er landbúnaðarøki.[1] Umvegis eitt slag av hvørsmansrætti hevur almenningurin og ferðafólk atgongd til stórar villar víddir í Noregi, har tey nærum ikki kunnu órógva vøkstur og djóralív og landbúnað. Men í Føroyum er eingin hvørsmansrættur. Tí við væl minni vídd av náttúru, tolir føroyska náttúran eisini væl minni trýst. Seyðurin hevur atgongd til beitilendið á allari uttangarðsjørðina alt árið, og rætt til vetrarbit av innangarðsjørðini vetrarhálvuna. Í Føroyum verður stórt sæð øll jørðin gagnnýtt til matvøruframleiðslu, serliga seyðahaldið fyllir nógv, og harafturat nakað av veiðu og dyrking av grønmeti.

Av tí sama er tað langt frá líka upplagt at skapa verndarøki í Føroyum, við støði í einari norskari lóg, og tað er helst eisini orsøkin til, at heimildin at økisfriða í galdandi náttúrufriðingarlóggávu er so sjáldan brúkt.

Galdandi jarðarlóggávur í Føroyum eru grundaðar á drúgvar, føroyskar siðvenjur. Øll umsiting av uttangarðsjørðini hjá ognarfólki og festibóndum byggir á jarðarlógirnar frá 1937 og seinni, umframt á væl eldri siðir og lógir, ið stava heilt afturi frá landnámstíðini.

Hvør hagi í Føroyum hevur sína egnu siðvenju, og tí dugir neyvan nakar betri at umsita hagarnar so væl og burðardygt sum tey, sum eiga og kenna sín egna haga. Hesi fólkini hava fingið frálæru í burðardyggari jarðarumsiting frá sínum forfedrum og hava stoltar venjur, sum í dag eru partur av serføroyska siðaarvinum. Hendan aldargamla mentan - og tey mongu túsund menniskjuni úti um landið - sum dagliga bera hesa mentan, eru sjálvur bulurin í serføroysku staðbundnu náttúrufyrisitingini.

---

[1] Statistisk Sentralbyrå: «Arealressurser etter hovedklasse. Landet. Kvadratkilometer. Prosent. 2022.» https://www.ssb.no/natur-og-miljo/areal/statistikk/arealbruk-og-arealressurser

Nógv av hesum verður nú, eftir ætlan, flutt til eina umsiting i Havn, sum sambært uppskotinum til náttúruverndarlóg **í fyrstu atløgu** fer at hava tørv á tveimum størvum á Umhvørvisstovuni at sita fyri nýggju náttúruverndarlógini, og annað starvið eigur at vera ein løgfrøðingur, stendur í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið.

Umhvørvismálaráðið metir, at tørvur verður á 1.400.000 kr. til Umhvørvisstovuna til endamálið. Alt eftir hvussu nógv heimildirnar í lógini verða brúktar, verður væntandi tørvur á **fleiri størvum** sum frá líður. Arbeiðið at fylla karmarnar í lógini út við reglum og vegleiðingum fer at krevja **fitt av arbeiðsorku** í Umhvørvismálaráðnum. Mett verður, at **Umhvørvismálaráðnum** fer at tørva 500.000 kr. til at styrkja deildina, sum varðar av náttúrumálum, stendur eisini í lógarviðmerkingunum.

Spurdómur er í, hví man ikki heldur brúkar fleiri ressursir til at styrkja um ta vælvirkandi skipan sum longu er, við dómstólslíknandi organum uttanfyri politisku skipanina, og heldur veitir henni eitt veruligt sekretariat, enn at uppbyggja eina nýggja, dýra og neyvan eins góða skipan, sum enntá liggur innanfyri politisku skipanina?

### 1.1. Ógreitt málbrúk og vantandi viðgerð av stórum spurdómum

Verður hugt nærri at lógaruppskotinum sjálvum, so er tað ikki skrivað á vanligum lógarmáli, men tað er skrivað við nógvum hugtøkum, sum fyri ein stóran part eru ókend og lítið brúkt í føroyska málinum og harvið eisini trupul at avmarka. Hugtøkini kunnu hava nógvar tulkingaróvissur við sær, tí um tað er ógreitt, hvør rættarstøðan er, kann tað seta rættartrygdina í váða og skapa ótryggleika.

Uppskotið ber í stóran mun brá av rættarligum standardum heldur enn greiðum rættarreglum. Standardir eru avbjóðandi at arbeiða við, tí tá er tað upp til fyrisitingina og dómsvald at menna venju við støði í metingum av faktuellum viðurskiftum, t.d. nær okkurt darvar brúkinum í **nóg stóran mun**, ella nær okkurt hevur **serligan týdning**, ella nær nakað **minkar um verndarvirðini** sambært verndarendamálinum o.s.fr. Tílíkar leysar orðingar kunnu skjótt gerast sera avbjóðandi hjá teimum, ið dagliga arbeiða við føroyska landbúnaðinum, tí rættarstøðan kann gerast alsamt meiri ógjøgnumskygd og ógreið.

Lógaruppskotið sjálvt viðger stórt sæð ikki grundleggjandi spurningar um t.d. ognartøku í mun til vanligu treytirnar sambært grundlógarinnar § 73, stk. 1, og uppskotið kemur als ikki inn á spurdómar viðv. ognarrættinum sambært grein 1 í 1. fylgisprotokoll til tann evropiska mannarættindasáttmálan, sum Løgtingið við lóg í ár 2000 gjørdi til part av føroyskari lóggávu, ella hvussu metast skal um proportionalitetin í mun til inntriv í ognar- og ræðisrættin hjá bóndum og óðalsfólki.

Heldur ikki viðger uppskotið nakað um sambandið millum ásetingar í uppskotinum viðv. atgongd til privata ogn í mun til § 72 í grundlógini ella grein 8 (1) í evropeiska mannarættindasáttmálanum, ið báðar verja rættin til privatlív, familjulív, heim og samskifti. Tílík atlit eiga at viga tungt í metingini, tá ið fyrisitingarligar aktir skulu setast í gildi, sum gera inntriv í vard rættindi.[2]

Uppskotið fyriheldur seg heldur ikki til aðrar altjóða sáttmálar, sum Føroyar hava tikið undir við. Gamaní verða summir altjóða sáttmálar nevndir, sum teir eisini skulu eftir standard-skabelónini hjá Lógartænastuni, men tá ið fyrisitingin skal gera kunngerðir og taka einstakar avgerðir og grunda tær á metingar, so eigur fyrisitingin at taka atlit at teimum viðurskiftum, sum standa í altjóða lóg og lata tey atlitini innganga í metingargrundarlagið við stórari tyngd fyri ikki at gera seg inn á altjóða lóg (instruktiónsreglan).[3] Serliga er tað viðkomandi, tá ið lógaruppskotið í so stóran mun byggir á standardir heldur enn greiðar rættarreglur, tí tá skal fyrisitingin til at meta um faktuellu umstøðurnar í málinum, og tað krevur ikki lítið av umsiting, innliti og eftirlit.

Eisini er § 55 í stýrisskipanarlógini viðkomandi, men hon verður heldur ikki nevnd.

***§ 55. Løgtingslóg, ella partur av løgtingslóg, hevur ikki gildi, um***
*a) hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, heimastýrið hevur gjørt við onnur lond,*

[2] Bent Christensen, Forvaltningsret – opgaver, hjemmel, organisation, Jurist- og økonomforbundets Forlag (1997), s. 161.
[3] Dansk Forfatningsret 2, Regering, Forvaltning og Dom, Henrik Zahle, Christian Ejlers' Forlag (2001), s. 216-217: "Med udtrykket "En første anvendelse af instruktionsreglen vedrører skønsmæssige afgørelser. Har en administrativ myndighed en skønsmæssig beføjelse, og er den pågældende beføjelse helt eller delvist reguleret af international ret, skal myndigheden udnytte sine skønsmæssige beføjelser på en sådan måde, at brud på international ret undgås... Er en administrativ beføjelse til at fastsætte regler underkastet traktatregulering, må det antages, at "vedkommende minister må anses for retligt forpligtet til at afholde sig fra administrativt at fastsætte regler, herunder ændringer af tidligere administrativt gennemførte bestemmelser, der umuliggør en traktatopfyldelse… Det kan endvidere antages, at en minister kan være forpligtet til at gennemføre ændringer af gældende administrativ regulering, såfremt en sådan administrativ ændring er nødvendig for at muliggøre en løbende traktatopfyldelse, jf. Justitsministeriets redegørelse i NTfIR 1971 s 75-76"".

b) ***hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, Danmørk hevur gjørt við onnur lond, og sum eisini fevnir um Føroyar.***

Júst hvussu lógaruppskotið fyriheldur seg til stýrisskipanarlógina burdi verið viðgjørt í uppskotinum, tí sum dømi kann nevnast ST-sáttmálin frá 16. desember 1966, sum Føroyar hava tikið undir við. Tann sáttmálin er sera viðkomandi fyri lutir og lunnindi og rættin hjá fólki at ráða yvir sínum ognum, sí art. 1, stk. 2:[4]

*"Alle folk kan til deres egne formål disponere frit over deres naturgivne rigdomskilder og ressourcer uden derved at gøre indgreb i forpligtelser hidrørende fra internationalt økonomisk samarbejde, der er baseret på princippet om gensidig fordel, og i folkeretten. Et folk må aldrig berøves sine eksistensmuligheder."*

Atlitið at verju av ogn, heimi og familju kann sigast at renna saman við hugtakinum mentan sum mannarættur sambært ST-sáttmálanum, og hevur eitt lógaruppskot gildi, tá ið tað ger seg inn á rættin hjá bóndum og óðalsfólki frítt at ráða yvir teirra lunnindum, sum staðfest er í ST-sáttmálanum, sum eisini fevnir um Føroyar?

Eisini kann nevnast, at lógaruppskotið als einki sigur um UNESCO-2003 sáttmálan[5], ið Føroyar hava tikið undir við, og sum verjir immateriella mentanararvin, sum aldargamla siðbundna seyðahaldið í Føroyum má sigast at vera ein sera týdningarmikil partur av. Fleiri túsund føroyingar og teirra familjur hava borið hesa livandi mentan, gjøgnum fleiri ættarlið. Óðalsmentanin man helst vera elsta mentan føroyinga. Seyðahaldið og serføroysku jarðalógirnar, sum í høvuðsheitum óbroytt hava regulerað viðurskiftini millum ánarar og hagapartar síðani landnámstíðina, eru líka so aktuell í dag sum fyri fleiri hundrað árum síðani. Lógir og siðvenjur tæna sínum endamáli og verða brúktar hvønn einasta dag - í øllum hagapørtum um alt landið.

---

[4] Bekendtgørelse af international konvention af 16. december 1966 om økonomiske, sociale og kulturelle rettigheder.
[5] Bekendtgørelse nr. 2 af 28. januar 2019 om udvidelse til Færøerne af UNESCO-konvention af 17. oktober 2003 om beskyttelse af den immaterielle kulturarv: "Den "immaterielle kulturarv": de praksisser, forestillinger, udtryk, kundskaber, færdigheder - såvel som redskaber, genstande, artefakter og kulturelle rum, der er forbundet dermed - som samfund, grupper, og, i nogle tilfælde, enkeltpersoner anerkender som del af deres kulturelle arv. Denne immaterielle kulturarv overføres fra generation til generation og genskabes til stadighed af samfund og grupper som svar på deres omgivelser, deres interaktion med naturen og deres historie, og giver dem en følelse af identitet og kontinuitet, og skaber på den måde respekt for kulturel mangfoldighed og menneskelig kreativitet. I denne konvention vil der alene blive taget hensyn til den immaterielle kulturarv, som kan forenes med eksisterende internationale menneskerettighedsinstrumenter såvel som med kravene om gensidig respekt blandt samfund, grupper og enkeltpersoner og om bæredygtig udvikling."

Uttan at fara í smálutir regulera jarðarlógirnar øll tey viðurskifti, sum tryggja okkum ein vælvirkandi føroyskan landbúnað **og eina vælvirkandi staðbundna náttúruvernd**. Eisini tí er tað sera átaluvert, at eitt uppskot til føroyska náttúruverndarlóg als ikki fyriheldur seg til føroyskan landbúnað og føroyskar jarðarlógir. Seyðurin, sum hevur verið ein samanrunnin partur av føroysku náttúruni, eins leingi og føroyingar hava búð í Føroyum, er ikki nevndur við einum orði í uppskotinum.

Í mun til millumtjóða sáttmálar er annars at siga, at tað er undrunarvert, at tað stendur í uppskotinum, at uppskotið ikki fær avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar, tá ið uppskotið als ikki viðger, hvussu komið er til ta niðurstøðuna.

Lógartænastan hevur í eftirkanningini av lógaruppskotinum havt sera nógvar atfinningar. Millum annað stendur skrivað, at uppskotið er kollveltandi og brýtur fullkomiliga við núverandi útgangsstøði, at alt livandi tilfeingi, sum tað ikki er lóggivið um, kann veiðast frítt.

Soleiðis er tað vanliga i einum landi við fólkaræði, at alt er frítt, uttan so at annað er ásett í lóggávuni. Men við hesum verður alt vent á høvdið, tí nú er alt bannað, uttan so at tað er heimilað í lóggávuni, ella landsstýrismaðurin í náttúruverndarmálum hevur givið loyvi til at veiða og taka.

Við hesum kann lógaruppskotið greitt gera seg inn á lunnindini hjá ognarfólki, t.e. m.a. serrætturin til veiðu, sum í øldir hava ligið til jarðarognina, og framvegis eru knýtt at henni.[6][7]

Ásetingin í § 6 er sambært Lógartænastuni ógvuliga víðfevnd, serliga tá hugsað verður um meginregluna um ikki at lóggeva, uttan at tað er neyðugt. Somuleiðis heldur Lógartænastan, at ásetingin er undarlig, tá ið havt verður í huga, at Føroyar vanliga meta seg sum eitt veiðusamfelag.

Ásannað verður í viðmerkingunum hjá Umhvørvismálaráðnum til eftirkanningina hjá Lógardeildini, at øll veiða og øll tøka verður bannað, uttan so at tað annaðhvørt er heimilað í

[6] Bjørk E.A: ”Færøsk bygderet” 3.del. Matrikulstovan 1963. Tórshavn. Kap 1-2, pp.1-6. Sí 2.del, kap.V, pp.178-183.
[7] Petersen, Poul: ”Ein føroysk bygd” Sprotin 2013. pp.45-92.

aðrari lóggávu, og har sum tað ikki er tað, skal loyvi fáast frá landsstýrismanninum í náttúruverndarmálum. Loyvið frá landsstýrismanninum fæst tó bert, um veiða ella tøka av villum djórum fer fram til tess at verja plantu- og djóralív ella til at verja almenn áhugamál.

Sum dømi kann nevnast, at vit hava onga lóg, ið regulerar kópaveiðu á landi. Tí kann hugsast, at loyvi til kópaveiðu skal fáast til vega frá landsstýrismanninum, áðrenn kópurin kann veiðast. Loyvið fæst tó bert, um tað er fyri at verja plantu- og djóralív ella til tess at tæna almennum áhugamálum. Hugsast kann tí, at jarðareigarar verða avmarkaðir í sínum rætti at gagnnýta síni lunnindi t.d. at fáa sær eitt kók av kópi til egna nýtslu, tí tað tænir ikki endamálinum við náttúruverndarlógini, og harvið verður veiðan fevnd av meginregluni um bann.

Undir øllum umstøðum er lítið at ivast í, at átøkini eftir lógaruppskotinum kunnu ávirka brúkið so mikið nógv, at verandi virksemi annaðhvørt má minkast munandi, ella halda uppat, tí verndin ger seg somikið nógv inn á ognar- og ræðisrættin hjá bóndum og óðalsfólki.

Tað er greitt, at um partur av einum haga verður útlagdur til verndarøki, missir hagin virði, ræðisrætt og bitisrætt hjá seyði, gæs og rossum at ganga í slíkum verndarøkjum, sum verða innhegnað. Serliga fara verndarøkir á láglendum, sum er vetrarbiti hjá seyðinum, at gera, at áseyðatalið í hesum høgum má skerast niður. Serliga verður torført hjá seyðinum, sum gongur á fjarskotnu høgunum, har einki fóður fæst - og tí bert hevur nevnda láglendi at halda seg til.

## 2. Grundlógarinnar § 73, stk. 1

Umhvørvismálaráðið ger í sínum ummæli av hoyringarskrivunum frá Føroya Bóndafelag og Føroya Óðalsfelag nógv burturúr at vísa aftur, at landið tekur við nøkrum ognarrætti til jørðina, at landið einki ræði fær á verndarøkinum annað enn atgongd at skipa fyri ávísari røkt til at røkja verndarendamálini, og harvið ger landið ongar avmarkingar í eigararæðinum. Hetta kann virka eitt sindur øvugt, tí avmarkingar í eigararæðinum kunnu saktans vera dømi um avhending av ogn eftir grundlógarinnar § 73, stk. 1, hóast landið ikki tekur við nøkrum ognarrætti til jørðina.

Í grundlógarinnar § 73, stk. 1 stendur:

*”Ejendomsretten er ukrænkelig. Ingen kan tilpligtes at afstå sin ejendom, uden hvor almenvellet kræver det. Det kan kun ske ifølge lov og mod fuldstændig erstatning.”*

Hugtakið *ejendom* skal skiljast vítt og fevnir um festirættindi, brúksrættindi, leiguavtalur, veðbrøv, v.m. Herundir allir teir lutir og lunnindi sum liggja til jarðarognina. Spurningurin er heldur, nær nakað er endurgjaldsfrí regulering, og nær nakað er *afståelse af ejendom* í grundlógarinnar høpi.[8]

Í løgfrøðini eru niðanfyri nevndu fýra treytir tær vanligu, tá ið metast skal um, hvørt eitt inntriv er ognartakandi (ekspropriativt):[9]

1) Hvussu nógvar borgarar rakar inntrivið?
2) Hvussu hart rakar inntrivið (intensiteturin)?
3) Hvør er grundgevingin fyri inntrivinum (causa)?
4) Kann inntrivið flyta rættindi frá A til B?

Í Føroyum eru allir hagapartar, umleið 400 - 500 í tali, matrikuleraðir. Í øllum høgunum fyriliggur ein matrikuldómur, sum staðfestir ognarrættin hjá ognarfólki í teimum einstøku høgunum. Hjá tí almenna hevur Búnaðarstovan fingið tinglýstan matrikuldóm, meðan festibrøvini hjá festarunum eru tinglýst sum byrðar á ognirnar í einstøku høgunum.

Sostatt kann eingin sum helst ivi verða um, at talan er um nakað, ið kemur undir breiða ognarhugtakið. Hvørt talan er um avhending (*afståelse*) av ogn (*ekspropriation*) ella ei má metast um ítøkiliga, og tá eru tær fýra omanfyri nevndu treytir av sera stórum týdningi.

Í flestu førum kann hugsast, at verndarøkini raka lutfalsliga fá, hvørs ræðisrættur verður avmarkaður. Harnæst má tað gerast ein ítøkilig meting av, hvussu hart inntrivið rakar ánarar og/ella rættindahavarar, tá ið eitt øki heilt ella partvíst verður lagt um til eitt verndarøki sambært §§ 20-25 í lógaruppskotinum. Sum víst á omanfyri fara verndarøkini at hava stórar avleiðingar fyri umsitingina av seyðahaldinum, tá ið hugsað verður um bitisrættin hjá seyði,

---

[8] Henrik Zahle, Danmarks Riges Grundlov med kommentarer, Jurist- og Økonomforbundets Forlag (1999), s. 369.
[9] Henrik Zahle, Danmarks Riges Grundlov med kommentarer, Jurist- og Økonomforbundets Forlag (1999), s. 374-380.

og hvussu hesin kann avmarkast í praksis, uttan at neyðugt verður at minka um seyðatalið munandi.

Grundgevingin hjá fyrisitingini verður sjálvsagt náttúruvernd. Men kann tann grundgevingin sannføra øll um, at inntrivið bæði er neyðugt og hóskandi til at náa endamálinum við náttúruverndini? Tað kann skjótt gerast ein stór avbjóðing hjá fyrisitingini í Havn at byggja sínar grundir á eitt betri faktuelt upplýst grundarlag enn ta vitan, ið fólk hava, sum í fleiri ættarlið hava røkt hagarnar. Tey hava bestu fyritreytirnar at meta um tað neyðuga og hóskandi fyri at verja náttúruna og einstaka hagan. Tey eru einfalt tann besta náttúrufyrisitingin.

Spurningurin kann eisini setast við, um ikki lógin leggur upp til, at inntriv kunnu bera í sær, at rættindi kunnu verða flutt frá rættindahavara A til rættindahavara B?[10]

Til hesa treyt kann nevnast, at í dag hava ferðavinnan og alivinnan stór fíggjarlig áhugamál at sleppa framat høgunum í Føroyum. Havbúnaðarfelagið, Ferðavinnufelagið og Visit Faroe Islands fegnast um uppskotið í teirra hoyringarskrivum. Av tí sama er orsøk hjá bóndum og óðalsfólki at halda, at rættindi kunnu vera flutt frá teimum til alivinnuna ella ferðavinnuna, eftir at verndarøkið er skipað sambært kap. 4.

Hetta verður grundgivið við, at tað stendur í § 29 í uppskotinum, at landsstýrismaðurin kann gera **undantak** frá eini verndarkunngerð, um tað ikki er ímóti endamálinum við verndini, **ella fyrilit fyri týðandi samfelagsáhugamálum gera tað neyðugt**.

Spurningurin er so, hvørji hesi týðandi samfelagssáhugamálini kunnu vera? Til at greina tað nærri ber til at lesa § 5 í uppskotinum, har tað stendur, at tiltøk eftir lógini skulu vigast upp ímóti øðrum týðandi samfelagsáhugamálum. Í viðmerkingunum til § 5 stendur, at við øðrum týðandi samfelagsáhugamálum meinast **fíggjarligir, sosialir og mentanarligir tørvir**.

Sostatt er ikki óhugsandi, at tá ið eitt øki fyrst er lagt út sum verndarøki, kann ein triðimaður (t.d. alivinna ella ferðavinna) koma inn gjøgnum bakdyrnar og fáa undantaksloyvi frá verndini, tí hansara fíggjarligi tørvur kann vera somikið samfelagsliga týðandi, at landsstýrismaðurin

[10] Poul Andersen (1954), s. 735.

kann koma í eina interessukonflikt millum náttúrvernd og týðandi vinnuliga gagnnýtslu av økinum, sum fyri samfelagið kann sigast at vera fíggjarliga týðandi og harvið legitimerað eftir undantaksregluni í § 29 í lógini. Tann vandin er ikki til staðar í verandi lóggávu, tí enn liggur avgerðarmyndugleikin uttanfyri ta politisku skipanina.

Í hesum sambandi er eisini vert at geva gætur, at tað í ummælinum hjá Umhvørvismálaráðnum til hoyringarskrivið frá Havbúnaðarfelagnum verður skrivað, at *”um týðandi samfelagsáhugamál gera tað neyðugt, kann landsstýrismaðurin viðmæla, at loyvi verður givið til virksemið, hóast tað ávirkar verndarvirðini, sbr. § 5”*.

Harumframt vísa viðmerkingarnar til ta ásetingina í norsku lógini ið svarar til grein 29 í føroyska lógaruppskotinum, ið heimilar undantak frá verndini, at eitt nú norska Oljumálaráðið, Statsnett SF og Energi Norge, siga at tørvur er á undantaki frá náttúruverndini vegna týðandi samfelagsáhugamál.[11] So hví skuldi vinnan í Føroyum, t.d. alivinnan, ferðavinnan og orkuvinnan ikki eisini kunnað biðið um, og fingið undantak frá teirri verndini, ið liggur á ognini hjá óðalsfólkum og bøndum?

## 2.1. Spurdómar viðv. ásetingum um endurgjald

Sum tað stendur í § 73, stk. 1 í grundlógini kann avhending av ognar- ella ræðisrætti bert fara fram mótvegis fullkomnum endurgjaldi. Umhvørvismálaráðið vil í sínum ummælisskrivi av hoyringarskrivinum frá Føroya Bóndafelag og Føroya Óðalsfelag vera við, at talan ikki er um ognartøku, tá ið talan er um inntriv sambært §§ 20-25, men sum víst á omanfyri kann eitt inntriv sambært §§ 20-25 vera ognar*takandi*, men spurningurin gerst tá, hvørjar reglur og mannagongdir, ið tá skulu farast eftir, og hvør metir um tað.

Sambært § 30 í lógaruppskotinum er rætturin til endurgjald treytaður av, at talan er um **1)** fíggjarligan miss, sum stendst av, at verndin eftir §§ 20-25 **2)** darvar brúki, **3)** sum er í gongd – og bert tað! Lógaruppskotið viðger ikki spurningin, um tað kann hugsast, at fíggjarligur missur stendst av øðrum orsøkum, um verndin sjálv ikki skuldi beinleiðis darvað aktuella

[11] «Om behovet for dispensasjon for tiltak av hensyn til vesentlige samfunnsmessige interesser» https://www.regjeringen.no/no/dokumenter/otprp-nr-52-2008-2009-/id552112/?ch=11

brúkinum, t.d. at virðið av ognini minkar, tí verndin avmarkar ræðisrættin og bitisrættin hjá seyði?

Víðari stendur, at fyri brúk, sum **1)** loyvi krevst til frá almennum myndugleika, geldur rætturin til endurgjald **bara**, um loyvi er fingið, **2)** áðrenn verndarætlan er almannakunngjørd eftir § 25. Sostatt sigur lógaruppskotið, um lisið verður við øvugtum forteknum, at um talan er um brúk, sum ikki krevur loyvi frá almennum myndugleikum, so ber altíð til at krevja endurgjald, men í viðmerkingunum til § 30 stendur hinvegin, at broytingar í brúki, sum ikki krevja loyvi, og sum eru farnar fram, eftir at uppskotið til verndarkunngerð er sent til hoyringar, geva ikki grundarlag fyri endurgjaldi. Her verður sostatt lóggivið í viðmerkingunum, tí lógarteksturin sigur einki um at senda til hoyringar, og hann fyriheldur seg bert til brúk, sum krevur loyvi. Víðari stendur, at *missur, sum stendst av, at forðað verður fyri broyttum brúki ella umlegging, gevur ikki rætt til endurgjald eftir ásetingini*. Her verður aftur lóggivið í viðmerkingum, og sum enntá gongur ímóti rættarpraksis á økinum, sí U.1975.718H (umrøddur niðanfyri).

Átøkini eftir lógaruppskotinum kunnu eisini avmarka møguligt framtíðar brúk, framtíðar sølumøguleikar, og framtíðar vinnumøguleikar. Hugtakið ogn skal sum áður nevnt fatast vitt, eins og tey serrættindini sum knýta seg til jarðarognina skulu tulkast dynamiskt. Fyri at taka afturíaftur aldargomlu ognarhugtøkini lutir og lunnindi[12], kunnu vit jú trúliga ímynda okkum, at inntrivini hjá landinum, við heimild í hesi lóg, fara at gera seg inn á annað og meir enn bara «brúk, sum er í gongd», men eisini virka ognar*takandi* fyri framtíðar brúksmøguleikar, og framtíðar vinnumøguleikarnar hjá teimum, sum eiga ella festa jørðina.

Hægstirættur hevur í dómi frá 1975 staðfest, at onnur nýtsla, sum eitt øki *kann brúkast til*, kann geva grundarlag fyri hækkaðum endurgjaldi, hóast brúkið ikki er í gongd, sí t.d. dómin U.1975.718H:

*"Det findes ikke udelukket, at et areal i landzone i handel og vandel kan have en øget værdi på grund af forventningen om en ændret anvendelsesmåde, selvom dette forudsætter tilladelser i medfør af by- og landzoneloven, som ejeren ikke har krav på, eller en ændring af*

---

[12] «Der kunne sikkert nævnes mange flere lunnindir end de her omhandlende rettigheder, f.eks. retten til udnyttelse af vandkraft og mineraler i undergrunden, og det er et spørgsmål, om man ikke må betragte *alle* rettigheder, der ikke er udskilt af jordfællesskabet som lunnindir, jfr. det II, s.182 citerede afsnit af dommer Bonnevies landboret og foran i kap.I."  Bjørk E.A: "Færøsk bygderet" 3.del. Matrikulstovan 1963. Tórshavn. Kap 1-2, pp.1-6.

*arealets zonestatus. I så fald må erstatningen ved ekspropriation omfatte denne øgede værdi. Tilkendt erstatning for en sådan værdi."*

Professari og doktari í løgfrøði við lærda háskúlan í Aalborg, Orla Friis Jensen, sáli, skrivaði í eini grein:[13]

*"Grundejere og andre rettighedshavere, der er genstand for ekspropriation, har efter grundlovens § 73 krav på at få erstattet det økonomiske tab, de lider i forbindelse med ekspropriationsindgrebet. Grundlæggende afhænger tabet af, hvad ejeren kunne have anvendt ejendommen til, dersom ekspropriation ikke havde fundet sted. Denne rådighed må udøves inden for de rammer, som følger af lov eller afgørelser i henhold til lov. Arealernes retlige status får dermed en helt afgørende betydning for erstatningsfastsættelsen.*

*Eksempelvis vil landzonearealer i almindelighed ikke kunne anvendes til udstykning og bebyggelse og derfor sjældent skulle erstattes som andet end landbrugsjord. Men arealet kan have en yderligere værdi på grund af forventninger om en ændret anvendelsesmåde, selv om dette forudsætter en zonetilladelse, som ejeren ikke har krav på, eller en ændring af arealets zonestatus. Såfremt en sådan øget værdi kan fastslås, skal der ydes erstatning herfor, jf. U 1975.718 H."*

Í hesum sambandi er serliga áhugavert at hava umrøddu §§ 5 og 29 í huga. Ásetingarnar geva landsstýrismanninum heimild at veita undantak frá verndini, um nóg týðandi samfelagsáhugamál tala fyri tí. Til ber at lesa lógaruppskotið á tann hátt, at uppskotið ikki tekur hædd fyri tí virði á økinum, ið rættindahavari potentielt hevði kunnað uppiborið umvegis avtalu við triðjamann (t.d. alivinnu ella ferðavinnu) um annað brúk av økinum, um ognartøkan ikki var farin fram, og hóast broytta nýtslan av økinum kravdi loyvi frá almennum myndugleika.

Tí er tað í minsta lagi undrunarvert, at Umhvørvismálaráðið skrivar, at lógaruppskotið ongar fíggjarligar og sosialar avleiðingar hevur fyri ávís øki í landinum, ella ávísar samfelagsbólkar í landinum. Verður lógaruppskotið samtykt soleiðis sum tað fyriliggur, kann tað gera seg inn á ognar- og avgerðarrættin til jørðina, og teir lutir og lunnindi, sum eru knýtt at jørðini. Har eru

[13] U.2010B.355.

bóndir, óðalsfólk v.m. dømi um samfelagsbólkar, ið uppskotið fær avleiðingar fyri, eins og einstøku hagarnir eru dømi um ávís øki í landinum.

Sambært § 32 í lógaruppskotinum kann talan **einans** gerast um fullkomið endurgjald, um talan er um inntriv, ið eru **1)** neyðug til tess at fremja **2)** røktartiltøk og umvælingartiltøk, sum **3)** munandi broyta standin, sum náttúran er í. Bert tá gerst talan um fullkomið endurgjald, sum grundlógin altíð setir sum treyt fyri ognartakandi inntrivum frá almennari síðu – og ikki bert tá ið talan gerst um neyðug inntriv til tess at fremja røktar- og umvælingartiltøk.

Síðani verður gjørt nakað burturúr mannagongdunum, tá ið mál eru fevnd av annaðhvørt §§ 30 ella 32, men um grundlógin skal virka sum eitt slag av endurgjaldsgrundarlagi fyri umstøður, ið lógin ikki greitt tekur hædd fyri, hvussu skulu partarnir tá taka støðu til, um teir eru fevndir av serligu prosessuellu reglunum fyri sýn og meting í náttúruverndarlógini, ella um teir skulu fylgja vanligu reglunum í rættargangslógini, har tað er ein heilur kapittul um sýn og meting?

Harumframt kann spurningur setast við, um tað yvirhøvur ber til í § 33 at regulera viðurskifti, ið eru regulerað í rættargangslógini, sum ikki er yvirtikið málsøki? Av tí sama kann lættliga eisini sáast ivi um, hvør lóggáva er galdandi, tá ið metast skal um slagið av inntrivi, atvoldarsambandið og spurningin um endurgjald – náttúruverndarlógin ella vanligu reglarnar?

## 3. Víðfevndar heimildir til landsstýrismannin

Uppskotið um náttúruvernd leggur eisini upp til, at landsstýrismaðurin fær víðfevndar heimildir við verndarkunngerð, tvs. reint fyrisitingarliga, at útleggja øki soleiðis, at tey verða hegnað inni, so seyðurin ikki sleppur framat. Hetta verður gjørt fyri at verja plantulív v.m.

Talan er ikki bara um at verja plantulív, kykt og djóralív, men talan kann eisini vera um at útleggja verndarøki, sum hava mentanarligt ella upplivingarligt virði, ella sum eru samleikaskapandi. Upp í landslagið verða eisini tald mentanarminnir, sum gera sítt til at geva landslagnum tess sereyðkennir.

Júst tey ”upplivingarverdu virðini” kunnu sigast at vera skræddarseymað til ferðavinnuna, sum helst eisini kann fáa undantak eftir § 29, samanhildið við § 5, tí tað kann koma undir sosialar og mentanarligar tørvir, ið viðmerkingarnar til § 5 nevna sum dømi um týðandi samfelagsáhugamál. Tað stendur greitt í §19, at landsstýrismaðurin við lógini fær heimild at skipa tað einstaka verndarøkið við kunngerð, og at gera av ”hvussu økið kann verða brúkt”. Sambært §18 er eitt av økisverndarmiðunum at ”vistskipanir skulu verjast”, men kortini skulu tær ”vera atkomandi til einfalt útilív”. Í viðmerkingunum til §21 verður sagt, at ”Tað upplivingarliga virðið hongur fyrst og fremst saman við útilívi." Víðari stendur í §20, at verndarkunngerðin ”…skal tryggja møguleikan at uppliva náttúruna í frið og náðum. Verndin er ikki til hindurs fyri gongd við fyriliti.”

Sambært lóg og siðvenju hava tað altíð verið hagapartarnir, sum hava átt heimildina at skipa nær hvør kann ganga hvar í haganum. Men av serligu viðmerkingunum til greinina skilst, at tað framyvir skal verða landsstýrismaðurin aleina sum fær hesa heimild í verndarøkjunum, herundir eisini at fáa ”samrøðu í lag við tey, sum fáast við skipað virksemi” og geva teimum loyvi til hvussu ferðslan verður skipað. Í viðmerkingunum verður ferðavinnan nevnd ítøkiliga.

Ferðavinnan sum dømi lýsir væl hvørjar avleiðingar víðfevndu heimildirnar hjá landstýrismanninum kunnu fáa. Ikki bert fyri náttúruverndina sjálva, sum kann koma undir stórt trýst frá vinnuligum seráhugamálum, men eisini fyri spurningin um, hvussu lógaruppskotið fyriheldur seg til tey mongu ivamálini nevnd omanfyri, eitt nú vv. lunnindum, ognartøku, endurgjald, jarðarviðurskiftum, lóggávu og landbúnað.

Øll lógin er í stóran mun ein rammulóg, har tað verður upp til fyrisitingina at ”lóggeva” í kunngerð og taka avgerðir. Lógin inniheldur áleið 55 avgerðar- og kunngerðarheimildir til landsstýrismannin, ið má sigast at vera óvanliga nógv.

Tað hevði í minsta lagi verið gott og rætt at sæð kunngerðaruppskotini, áðrenn lógin bleiv løgd fyri Løgtingið, tí Løgtingið fer at frásiga sær nógv vald við hesum lógaruppskotinum og lata tað upp i hendurnar á einum einstøkum landsstýrismanni. Hetta er eisini nakað, ið Lógartænastan eftirlýsir í eftirkanningini.

## 3.1. At flyta ræði úr lokaløkjunum til miðstaðarøkið, tá verndarøki verður skipað

Vísandi til serføroysku staðbundnu náttúrufyristingina, framgongur tað greitt, at tey ið gjørdu nýggju jarðarlógirnar í 30´árunum, løgdu stóran dent á framhaldið og týdningin av lokalum innliti og eftirliti. Sum dømi um hetta verður víst til lóg um haugers styrelse og drift[14]. Her er ásett, at eitt og hvørt ognarfólk í bygdini, sum hagin hoyrir til, og ein og hvør festari hevur skyldu at taka við vali sum hagastýrislimur í høgunum. Sama áseting er galdandi fyri tey, sum eru uppisitarar fyri uttanbíggjarjørð. Fyri ta almennu jørðina (kongsjørðina) hevur tað frá gamlari tíð verið lógarkrav um, at tann, sum skuldi festa ein garð, skuldi hava fastan bústað í bygdini, har festið hoyrdi til, í dag er tað bústað í somu oyggj.[15]
Grundtankin er, at fólk sum skulu stýra haganum, búgva í bygdini har hagin hoyrir til, so tey kunnu røkta hagan hvønn dag, og fylgja við, um okkurt er áfatt í haganum.

Dømini um hetta eru mong, m.a:
- at reka óviðkomandi hagaseyð av bønum um summarið;
- at tey kunna fylgja við fuglalívinum í berginum;
- at tey kunna fylgja við, at einki óviðkomandi fólk gongur í haganum, tá fuglurin reiðrast, ella tá lembing er, ella haruskjóting, tá lendið er slitið, tá vandi er fyri skriðulopum, v.m.;
- at tey kunna fylgja við gróðrinum og meta um, hvørt áseyðatalið í haganum er tað rætta, so tað er javnvág í náttúruni. Tey kunna fylgja við, um tað er burðardyggur vøkstur fyri gras, plantur og fugl, sum er grundarlag fyri nøktandi biti til seyð, neyt, gæs og annan fenað.

Tey, sum hava gjørt jarðarlógirnar, hava vitað fullvæl, at jarðarviðurskiftini í hesum 400 til 500 høgunum í Føroyum eru sera ymisk. T.d. hava nakrir hagar nógvan fugl í bjørgunum, nakrir hava kópaveiðu, nakrir kunnu hava síla- og laksaveiðu í áum og vøtnum, nakrir hagar hava neyt og gæs og seyð, og nakrir hava bara seyð og haruskjóting. Nakrir hagar er høgligir og liggja nærhendis bygdini, meðan aðrir hagar liggja á fjarskotnum leiðum og eru torførir at røkta. Nakrir hagar hava kenning og aðrir hava felag.

---

[14] Grein 4 í Lov nr. 172 av 18. maj 1937 for Færøerne om Haugers Styrelse og Drift m.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020

[15] Grein 5 stk. 1 í Løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 194 frá 23. desember 2018

Omanfyri nevndu viðuskifti eru bert nøkur fá dømi. Men kortini eru tey við til at lýsa týdningin av lokalu náttúrufyrsitingini í einstøku høgunum í Føroyum.

Í galdandi lóggávu hava vit staðbundnar friðingarnevndir, staðbundnar landbúðanarstevnur og staðbundnar útskiftingarnevndir. Friðingarnevndir taka sær av náttúruvernd og náttúrufriðing. Sýslumaðurin saman við lokalum umboðum sita í friðingarnevndini. Avgerðir hjá friðingarnevndum kunnu kærast til Yvirfriðingarnevndina, har Sorinskrivarin er føddur formaður. Avgerðir hjá Yvirfriðingarnevndini kunnu ikki kærast.

Viðmerkjast skal, at friðingarnevndin ongantíð hevur gjørt seg inn á raksturin av seyðahaldinum ella landbúnaðarraksturin soleiðis at skilja, at tað hevur ongantíð verið talan um at innhegna eitt friðað øki fyri seyði. Helst tí tað illa letur seg gera í Føroyum samanborið við landafrøðiligu umstøðurnar í Noregi.

Tá ið talan er um útskifting, er tað sama galdandi. Vit hava eina Útskiftingarnevnd og eina Yvirútskiftingarnevnd.

Eru trætumál um landbúnaðarviðurskifti, hava jarðareigararnir møguleika at lata ta staðbundnu landbúnaðarstevnuna avgera málið. Møguleiki er at kæra málið til Yvirlandbúnaðarstevnuna undir somu fortreytum sum í friðingar- og útskiftingarmálum. Tað vil siga, at avgerðin hjá Yvirlandbúnaðarstevnuni er endalig.

Sambært galdandi Lov for Færøerne om Haugers Styrelse og Drift frá 1937 hava eigararnir av høgunum ræðisræettin til felagshagarnar. Hægsti myndugleiki í haganum er hagastevnan, sum er at meta sum ein aðalfundur í einum partafelagi. Hagastevnan velur eitt hagastýri at taka sær av vanliga rakstrinum, og tað er at meta sum ein nevnd í einum partafelagi. Síðani velur hagastevnan ella hagastýrið ein røktingarmann til at taka sær av seyðahaldinum.

Ongin áseting er t.d. í uppskotinum til náttúruverndarlóg um, hvør skal seta hegnið upp kring verndarøkini, ella hvør skal halda hegnið viðlíka og reka seyð, sum er komin inn á eitt verndarøki. Eisini vita vit, at tað í stórkava verður sera trupult at halda seyðinum burtur frá verndarøkjum.

Í Lov om Benyttelse af Grandestævne frá 1937 eru ásetingar um, hvussu trætur um jarðarviðurskifti verða loystar. Lógaruppskotið um náttúruvernd kann kolldøma hesa lóg, um so er, at talan er um verndarøki. Tað vil siga, at avgerðarrætturin verður fluttur frá tí lokala samfelagnum til almennu umsitingina.

Í Lov om Benyttelse af Indsøer og Vandløb frá 1937 er ásett í § 1, at jarðareigarin hevur ræðisrættin til vatnið í vøtnum, áum ella áarløkum, sum eru í tí einstaka haganum. Um so er, at vøtn, áir ella áarløkar verða løgd til verndarøki, verður ræðisrætturin eisini fluttur frá tí lokala samfelagnum til almennu umsitingina.

Í Lov om Vandledningar frá 1909 er ásett, at jarðareigarin hevur ræðisrættin til vatnið, men at hann má tola, at kommunan tekur vatn úr ánni til drekkivatn. Um so er, at slíkar áir verða útlagdar sum verndarøki, verður ræðisrætturin fluttur frá tí lokala samfelagnum til almennu umsitingina.

Í § 41 í Lov um Hegn og Markfred frá 1937 er ásett, at ongin hevur rætt til at fara av bygdargøtum uttan loyvi frá haganum. Um so er, at øki verða útløgd til verndarøki, verður ræðisrætturin fluttur frá eigaranum til almennu fyrisitingina.

Kemur hetta nýggja lógarupskotið í gildi, kann landsstýrismaðurin einsamallur og uttan at venda sær til nakra staðbundna nevnd ella Yvirfriðingarnevnd áseta, at eitt øki skal vera verndarøki. Er ein jarðareigari ónøgdur við, at eitt øki verður útlagt til verndarøki, hevur hann í fyrstu atløgu bara møguleika at kæra til Føroya Kærustovn, tó uttan at fáa nakra endaliga avgerð frá einum dómara.

Um so er, at lógaruppskotið um náttúruvernd verður samtykt, uttan at verða í samljóði við verandi jarðarlóggávu, og uttan at taka neyðug atlit til lokalar skipanir, so kann spurnartekin av álvara setast við, um komandi miðstýringin av náttúruni megnar at verða á sama stigi, sum tann staðbundna nátturufyrisitingin í teimum lokalu bygdasamfeløgunum?

Spurningur kann av røttum setast við, hví ikki fleiri fylgibroytingar eru gjørdar í omanfyri nevndu lógum, ið taka hædd fyri møguligum mótstríði millum lógirnar?

4. **Ein vælvirkandi trætuskipan avloyst av einari dýrari, tyngri og fakliga veikari skipan**

Tá ið jarðareigarin er tann fíggjarliga veikari parturin, gerst trupult hjá honum at fara til rættarskipanina við einum slíkum máli, sum ofta er sera víðfevnt, kensluborið og kostnaðarmikið. Ja, faktiskt skal tað broytast soleiðis, at tað, sum hevur virkað væl í nógv ár við langum og drúgvum siðvenjum, framyvir skal avgerast av Føroya Kærustovni í fyrsta instansi. Kærustovnurin hevur ikki nakra serfrøði innan føroyskan landbúnaðarrætt. Harnæst kann málið klagast til Løgtingsins umboðsmann og/ella leggjast fyri Føroya Rætt.

Tann dómurin kann síðani skjótast inn fyri Eystara Landsrætt, og at enda kann farast í Hægstarætt, um loyvi fæst til tað frá Procesbevillingsnævnet. Tílík mál kunnu væl hugsast at taka nøkur ár, og ikki ger tað støðuna lættari, tá ið alt byggir á norska lóggávu og norskar kringumstøður. Fleiri kunnu tí hugsast at geva upp og sleppa málunum, tí tíðin og kostnaðurin ikki standa í mát við møguligan vinning.

Verandi skipan virkar sum eitt sakkønt, dómstólslíknandi og skjótt arbeiðandi trætu-organ, sum vit t.d. kenna frá gerðarrættinum, umframt at tað er ein nógv bíligari og pragmatiskari skipan fyri partarnar. Skilabetri hevði tí verið at varðveitt friðingarnevndirnar og teirra royndir og heldur styrkt um teirra skipanir og førleikar við meira løgfrøðiligari og náttúrufrøðiligari servitan og einum vælvirkandi sekretariati.

Álitið á skipanina verður betri tryggjað, um náttúrufriðingin liggur hjá sakkønum dómstólslíknandi nevndum uttanfyri politisku fyrisitingina, heldur enn hjá politiska myndugleikanum, sum kann koma til at fyrisita málsøki við fíggjarligum áhugamálum í føroysku høgunum s.s. alivinnu, ferðavinnu og orkuvinnu. Av tí sama kann lættliga koma áhugastríð millum friðing av náttúruni og vinnuligu seráhugamálini, sum vilja sleppa framat náttúruni umvegis §§ 5 og 29.

Mælt verður til at varðveita og styrkja friðingarnevndirnar, og at strika hesar møguleikar fyri undantaki í omanfyri nevndu greinum í lógaruppskotinum.

## 5. Samanumtøka

Samanumtikið er at siga, at uppskotið er grundað á norska lóggávu, siðvenjur og faktuellar umstøður, sum eru ókendar í Føroyum, og sum als ikki hóska seg til smá føroysk jarðarviðurskifti. Tað fer at gera málini truplari og dýrari at føra, tí partarnir mugu brúka nógva tíð til at seta seg inn í norsk viðurskifti, ið hava ligið til grund fyri norsku lóggávuni, tá ið trætumál í Føroyum skulu loysast.

Málbrúkið er torskilt og ógreitt, og tað kann seta rættartrygdina í váða. Tað byggir eisini á sokallaðar rættarligar standardir heldur enn greiðar rættarreglur, og tað er stak óheppið, tá ið uppskotið í stóran mun kann gera seg inn á rættindi hjá borgarum. Sera nógv vald verður latið upp í hendurnar á landsstýrismanninum og fyrisitingina at meta um og at regulera nærri í kunngerð.

Uppskotið flytir nógv ræði frá tí staðbundna, har vitan, innlit, siðvenjur o.a. eru uppbygd gjøgnum fleiri ættarlið til eina nýggja og kostnaðarmikla fyrisiting í miðstaðarøkinum, sum í fyrstu atløgu er mett at kosta 1.900.000 kr., stendur í viðmerkingunum. Hendan fígging kundi verið væl betri brúkt, sum mælt til omanfyri, uppá at varðveita og styrkja verandi skipan og førleikar hjá friðingarnevndunum.

Áleið 55 kunngerðar- og avgerðarheimildir verða latnar upp í hendurnar hjá landsstýrismanninum at skipa nærri ella at avgera ítøkiliga, og tað krevur stóra umsiting at umsita. Tí stendur helst í viðmerkingunum, at man í fyrstu atløgu fer at seta tveir fulltrúar í Umhvørvisstovuni og ein i Umhvørvismálaráðnum.

Tá ið Løgtingið gevur so nógv vald til ein landsstýrismann, átti Løgtingið at kravt at sæð tey kunngerðaruppskotini, ið landsstýrismaðurin hevur í hyggju at seta í gildi, áðrenn lógin verður samtykt. Hetta verður eisini eftirlýst í eftirkanningini hjá Lógartænastuni, men spurningurin er, hvussu langt hetta arbeiðið er komið?

Tá ið landsstýrismaðurin fær so nógv vald á einum so týðandi øki, kann hann lættliga koma í interessukonflikt millum náttúruvernd og møguleikan fyri at gera undantøk sambært §§ 5 og 29.

Skilabetri hevði verið at varðveitt friðingarnevndirnar og teirra royndir og heldur styrkt um teirra skipanir og førleikar við meira løgfrøðiligari og náttúrufrøðiligari servitan og einum vælvirkandi sekretariati.

Uppskotið viðger ikki týðandi tættir so sum ognarrættin og privatlívið eftir evropeiska mannarættindasáttmálan, og í heilt avmarkaðan mun fyriheldur uppskotið seg til samsvarandi ásetingar í grundlógini.

Lógaruppskotið fyriheldur seg als ikki til millumtjóða sáttmálar, ið Føroyar hava tikið undir við, og sum eru sera viðkomandi, tá ið fyrisitingin skal gera kunngerðir og taka avgerðir grundaðar á meting. Hesir eru eisini viðkomandi fyri § 55 í stýrisskipanarlógini og ST-sáttmálan frá 1966.

Lógaruppskotið fyriheldur seg heldur ikki til UNESCO-2003 sáttmálan, ið Føroyar hava tikið undir við, og sum verjir immateriella mentanararvin, sum aldargamla siðbundna seyðahaldið í Føroyum má sigast at vera ein týdningarmikil partur av.

Harumframt er tað mikið áhugavert, at m.a. Havbúnaðarfelagið og aðrir vinnuligir aktørar frøast um uppskotið, og møguleikan fyri undantaki í verndini sambært §§ 5 og 29, tí sambært teimum ásetingunum kann landsstýrismaðurin geva undantak frá verndini, um hann metir, at tað tænir týðandi samfelagsáhugamálum, tvs. at nøkta fíggjarligar, mentanarligar ella sosialar tørvir, sum tað stendur orðað í viðmerkingunum til § 5.

Eisini ber uppskotið í sær sera ivasamar spurningar viðv. endurgjaldi, har tað deils verður lóggivið í viðmerkingum og deils í mótstríð við tað, ið vanlig løgfrøðilig útfylling sum øvugtdømi leggur upp til, eins og tað ikki tykist at samsvara við Hægstarættarpraksis á økinum. Heldur ikki eru orðingarnar nóg greiðar, nær eitt inntriv er fevnt av lógini, og nær tað er fevnt av § 73 í grundlógini, og hvør skal meta um tað, og hvørjar prosessuellar rættarreglur eru galdandi í hvørjum føri, tá ið farið verður eftir endurgjaldi í rættarskipanini?

Framyvir skulu jarðareigarar og rættindahavarar frá einum skjóttvirkandi, ópolitiskum og pragmatiskum trætu-organi, ið hevur virkað væl í langa tíð, og sum hevur gott innlit í jarðarlóggávuna og siðvenjurnar, til at skula royna avgerðir um at leggja øki út sum verndarøki hjá Føroya Kærustovni, sum ikki hevur hesar førleikar. Síðani kunnu málini ganga sína drúgvu gongd í kostnaðarmiklu og drúgvu rættarskipanini. Drúgva og dýra rættargongdin

kann hugsast í størri mun at tæna áhugamálunum hjá landinum enn hjá jarðareeigarum og rættindahavarum, tí vinningurin stendur ikki í mát við stríðið, sum stendst av at føra eitt langt rættarmál. Eisini á tí grundarlagnum hevði verið betri at varðveitt og styrkt um verandi skipan.